U P P R I T

Til: Løgtingsins Vinnunevnd 23. apríl 2013

Frá: Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Handverksmeistarafelag, Føroya Prentsmiðjufelag og Reiðarafelagnum fyri Farmaskip

Viðmerkingar til løgtingsmál 122/2012
– uppskot til løgtingslóg um semingslóg

Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Handverksmeistarafelag, Føroya Prentsmiðjufelag og Reiðarafelagið fyri Farmaskip sendu longu sínar viðmerkingar til uppskotið til nýggja semingslóg til Vinnumálaráðið 2. november 2012.

Við hesum uppritið verður felaganna áskoðan á fráboðanarfreistina tó lýst nærri.

Fráboðanarfreistin
Higartil hevur tað fyri tað mesta verið soleiðis, at tað er verkfall í somu løtu samráðingarnar/semingsroyndin endar. Sum kunnugt hevur hetta við sær, at arbeiðsgevarar í fleiri førum steðga virkseminum ein til tveir dagar, áðrenn sáttmálin gongur út. Verður talan um, at semingsmaður kemur uppí, endurtekur hetta seg. Tað vil siga, at hóast partarnir enn sita við samráðingarborðið, kann talan verða um tveir til fýra dagar fyri hvørja samráðing sær. Hetta verður gjørt fyri ikki at brenna inni við óvirkaðari vøru, ella skula sleppa einum arbeiði á hálvum gekki.

Serliga er tað innan ali- og kryvjivirkini og fiskavøruídnaðin at hetta ger seg galdandi. Sambært tølum frá Hagstovuni vóru lønarútgjaldingarnar í hesum bólkum í 2012 tilsamans 525.895.700 kr, sum svarar til 2.103.583 kr um dagin (250 arbeiðsdagar í 2012). Umframt at løntakararnir missa góðar 2,1 milliónir kr um dagin, missir landið eisini skattainntøkur. Um vit seta skattin av hesum pengum til 40 %, so svarar hetta til 841.433 kr í mistari skattainntøku um dagin. Og afturat hesum koma øll sosialu gjøldini.

Á privata arbeiðsmarknaðinum hevur ikki verið nakað størri verkfall síðan 2003 – tvs 10 ár og 4 samráðingarrundir síðan. Hóast hetta hevur arbeiði av omanfyri nevndu orsøkum í fleiri førum ligið stilt, sjálvt um einki verkfall hevur verið. Hetta kostar bæði fyritøku, løntakara og samfelagnum pengar. Fyri at sleppa undan verkfalslíknandi avleiðingum, hvørja ferð samráðingar eru, er neyðugt við eini fráboðanarfreist í sambandi við verkfall.

Arbeiðarafeløg hava fört fram, at verkføll higartil hava verið stutt og effektiv, og at ein fráboðanarfreist fer at leingja verkføllini munandi. Føroya Arbeiðsgevarafelag vísir í hesum sambandi á, at bæði í 2001 og í 2003 høvdu vit lang verkføll á ávikavist 3 og 4 vikur. Fráboðanarfreistin hevur onga ávirkan á longdina á einum verkfall yvirhøvur.

Tað er skilaleyst, at arbeiðið verður niðurlagt í sambandi við sáttmálasamráðingar, uttan so at arbeiðssteðgur er lýstur. Tí er tað týdningarmikið, at ein nýggj semingslóg hevur reglur um fráboðanarfreist, soleiðis at avleiðingar av samráðingum bert verða, tá samráðingarnar eru slitnaðar.